# Tann loynda styrkin

## Lívførið í føroyskari mentan við atliti til sjálvstýrismenningina í nýggjari tíð og til lagnuna hjá øðrum atlantstjóðum

**Javnaðarflokkurin - søguliga og í verki ein sjálvstýrisflokkur. Ætla norðbúgvar, við Íslandi á odda, at lata síni mál víkja fyri enskum? Vælan um tjóðskap og samleika er heilsubót móti nationalismu. Ósamsvarið millum føroysk mentunarlig og politisk avrik. Før-oysk sjálvstýrismenning, ein dýnamisk tilgongd, ið ikki vendist við Triði partur av fyrilestri, sum Hanus Kamban helt á landsfundi Javnaðarfloksins**

**Eftir Hanus Kamban**
*Triði partur*



*Eivør Pálsdóttir og Týr eru dømi um, at tað ber til á skapandi hátt sameina kvæða- og kingoløg og nútíðar tónleik*

### Javnaðarflokkurin og sjálvstýri

Tað verður helst ov drúgført á hesum stað at geva Heimastýrislógini eitt ummæli. Sum kunnugt verður hon av summum hildin at vera ein vanlig lóg, sum danska fólkatingið kann taka aftur. Hinvegin hevur eitt nú tann danski løgfrøðingurin Frederik Harhoff ta hugsan, at Heimastýrislógin løgfrøðiliga stendur millum vanliga lóg og grundlóg, er av ríkiskendum slag og ikki kann takast aftur.

Hvat kunnu vit, á hesum baksýni, siga um Javnaðarfloksins avrik, har tað snýr seg um føroyska sjálvstýrismenning? Flokkurin hevur mangan, og serstakliga tey seinastu árini, ikki fingið gott ummæli, um ein hugsar um sjálvstýrispolitikk, og tað er ikki óvanligt at hoyra hann skýrdan sambandsflokk.



*Atli Dam, løgmaður 1970-84, 1985-89 og 1991-93. Kanska tann politikarin, ið hevur flutt Føroyar longst á sjálvstýrisleið*

Hyggja vit at veruleikanum, er myndin øðrvísi. Eitt gott dømi um hetta, undan Heimastýrislógini, er avtøkan av grein 7 í 1938, sum kom sum eitt úrslit av kravi á Føroya Løgtingi frá Javnaðarflokkinum, Vinnuflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum. Av meira ímyndaligum týdningi var samtyktin, gjørd á Føroya Løgtingi seinast í 1943 av Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum um, at løgtingið bara skuldi flagga við føroyskum flaggi.

Nógv størri týdning fyri føroyska sjálvstýrismenning enn hesar samtyktir hevði, sum longu fyrr umrøtt, Heimastýrislógin, sum kom í gildi fyri Føroyar tann 1. apríl 1948.

Um vit nú hyggja at tíðarskeiðinum aftan á 1948, so er vanligt at hoyra, at sjálvstýrislandsstýrið 1962-66 var einasti glottin hesa hálvu øldina, um hugsað verður um sjálvstýrismenning. Men veruleikin er tann, at ikki sjálvstýrislandsstýrið 1962-66, men landsstýrið 1974-78, har Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin samstarvaðu, flutti Føroyar longst á sjálvstýrisleið.

Í hesum skeiði fóru føroyskir politikarar undir at gera sjálvstøðugar fiskivinnuavtalur við onnur lond, fyrst og fremst Sovjetsamveldið. Á henda hátt varð støðið lagt undir sjálvstøðugan føroyskan samráðingarførleika. Somuleiðis varð í hesum skeiði, eftir grein 9 í Heimastýrislógini, fyrisitingin av heilsu-, almanna- og skúlamálum framd. Hugsar ein um, hvussu stóran týdning tað hevur at byggja upp, stig fyri stig, eina umsitingarliga mentan og hevd, so eru hetta kanska tey mest týðandi stig, sum nakrantíð eru tikin fram ímóti føroyskum politiskum sjálvbjargni.

At fara at geva einstøkum politiskum flokkum eintýdd skotsmál er ikki altíð lætt, mangan kanska eisini ósøguligt. Sum heild ber kanska til at siga, at føroysk framgongd móti víðkaðum politiskum frælsi er íkomin takkað veri einum samróðri millum sosialt medvitna politiska pragmatismu og eina meira ótolna tjóðskaparliga ákoyring.

### Ein nýggj hóttan

Áðrenn eg komi til eina niðurstøðu, fari eg at tríva í ein annan tátt av mentunarligum slag og samstundis royna at kveita fram í tíðina. Har tað snýr seg um mentan, ber illa til at hugsa í árum, men heldur - sum gjørt hevur verið í hesum fyrilestri - í øldum. Heldur ikki ber til at gera forsagnir út frá verandi blóman, ið - sum frá líður - kann roynast stokkut og svikalig.

Mín spurningur í hesum sambandi ljóðar: Er føroyskt til um hundrað ár? Hóast ein slíkur spurningur í roynd og veru krevur eitt drúgt svar, fari eg her móti endanum at royna at avmarka meg. Málfrøðingar hava tann seinasta mansaldurin granskað í einum fyribrigdi, teir rópa máldeyða. Fyribrigdið er ikki nýtt, tvørturímóti kenna vit frá klassiskari tíð mong dømir um útdeyð mál, eitt nú bithyniskt, etruskiskt, sumeriskt og hittitiskt.

Tá ið áhugin fyri hesum evni er vaksandi, kemur tað av, at tær atvoldir, sum í 20. og 21. øld ávirka málanna trivnað og lagnu - kríggj, tjóðskaparlig imperialisma, vistfrøðilig árin, altjóðagerð, samskiftismentan - hava fingið eina styrki og eina ávirkan, sum einki søguligt fordømi er um. Her kann verða nevnt, at sjónvarpið - sum tess árin sorlandi herjar og drepur, einamest í heimspørtum við viðbreknum málum og mentanum - av onkrum granskara hevur verið rópt "mentunarligt nervagass".

Men umframt hesar atvoldir uttanífrá hava eisini tað vit kunnu rópa innanatvoldir týdning fyri, hvussu eitt mál lívbjargar sær. Her verður hugsað um tann hugburð, ein tjóð hevur yvir av øðrumegin sínum egna máli og hinumegin tí hóttandi granna- ella hjálandamálinum. Vit hava í hesum fyrilestri longu nevnt, at millum føroyskt og danskt var í miðøld og langt upp í tíðina eitt slag av javnstøðu. Kanska kann henda javnstøðu lutvís førast aftur til, at føringar, hóast teir virdu danskt, samstundis hildu tað vera eitt sindur láturligt, ikki minst tá teir sjálvir talaðu tað. Teir skaptu tí eitt triðja mál, av summum í dag rópt gøtudanskt, sum gjørdist sum eitt slag av fríholti millum móðurmálið og hjálandamálið.

### Avbjóðingin frá enskum

Tað áhugaverda og nýggja í 21. øld, er at vit føringar - eftir í fimm øldir at hava havt danskt sum hjálandamál - hava fingið eitt nýtt hjálandamál: enskt-amerikanskt. Spurningurin er nú, um vit duga at leggja sjógv millum okkara móðurmál og tað nýggja høvuðsmálið, á sama hátt sum vit megnaðu at halda danskt burtur frá okkum. Ymiskt bendir á, at hvørki vit føringar ella norðbúgvar sum heild fara at megna hetta.

Í løtuni er eitt slag av norðurlendskum, ið er sett saman av svenskum, norskum og donskum, hjálparmál ella lingua franca, tá ið norðbúgvar úr ymiskum londum hittast á fundi. Men millum íslendingar er ikki óvanligt, at enskt ella amerikanskt heldur verður brúkt til hjálparmál í norðurlendskum samskifti. Hetta er kortini bara tað fyrsta stigið í eini málsligari gongd, ið skjótt kann gerast meira víðfevnd.

Fyri o.u. einum ári síðani var eg á eini ráðstevnu fyri málfrøðingar í Oulu (Uleåborg) í Finnlandi. Millum fyrilesararnar var ein íslendingur, sum m.a. tosaði um framtíðar málmentan í Norðurlondum. Ein varnaðist, at tey hugtøk, hesin maður førdi fram, vóru orðað á enskum, og at tað tilfar, hann - so at hansara norðurlendsku brøður og systrar skulu skilja seg betur - læt varpa upp á veggin við uppvørpu og glæru, somuleiðis, frá høvdi til sporl, var á enskum.

Uppaftur meira áhugavert var, at fyrilesarin (ið sjálvur ikki var málfrøðingur) hevði kannað, hvat íslendskur ungdómur hugsaði um norðurlendska málmentan í framtíðini. Úrslitið vísti, at hugsanin var, at norðbúgvar í øllum týðandi viðurskiftum - t.e. (um eg skilti hann rætt) har talan var um politikk, heimspeki, bókmentir, gransking osfr. - fóru at brúka eingilskt. Tey norðurlendsku málini fóru hereftir mest at verða brúkt í dagligum viðurskiftum, eitt nú matgerð.

Venda vit aftur til hugtakið máldeyða, so er eitt slíkt sjónarmið (sum eisini er vanligt at hoyra í Danmark) fullgott dømi um eina virðisbroyting, sum hevur við sær, at móðurmálið verður mett sum verandi lægri enn hjálandamálið. Ein slík virðisbroyting var ein av mongum táttum í teirri gongd, sum endaði við, at tey norrønu málini í Hetlandi og Orknoyum doyðu út. Einum renna í hesum sambandi í huga nøkur orð eftir málgranskaran Herbert Schiller:

Hvat gagnar tað, um ein tjóðskaparrørsla í mong ár hevur stríðst fyri at vinna frælsið, um virðir og strembanir frá hjálandaveldinum, ið tóktist at hava lútað, sleppa at taka grundina undan hesum sama frælsi?

### Tann føroyska evolutiónin

Um vit nú venda aftur til tann skaldadóm, sum eg legði fyri við at sipa til í hesum fyrilestri, so ber eftir mínum tykki sum heild ikki til at siga, at yrkjarin altíð er beinrakin, tá ið hann fellir dóm yvir føringin.

Gaman í, tey avreksverk, við dámi av eygnarivi, sum tala til skaldahjørtu, hava vit føringar sjáldan megnað at skapa. Vit hava onga orrustu vunnið, og tað untist okkum føringum ikki higartil, lið við lið og øksl móti øksl - við einum sjónligum taki, sum vakti ans um heimin - at krevja og vinna tjóðarfrælsi.

Teir sigrar, føringar hava vunnið, eitt nú mentunarsøguliga, bera - sum víst á í hesum fyrilestri - dám av ósjónligari styrki, og føringsins leið tykist, skapt sum hon er av umstøðum og fyritreytum, at vera, ikki kollveltingin, men stigmenningin, tann evolutionera kósin. Meðan ivaleyst mong dømir eru um, at skald hava fagnað revolutiónini við lovkvæðum, er neyvan nakað dømi um ein yrkjara, sum á sama hátt hevur sungið evolutiónini - ið sum frá leið mangan roynist dyggari - prís. Og kortini, so yrkir Hans Andrias Djurhuus:

*Tað vóru ikki hjálmar*
*og ikki lúðraljóð,*
*tað vóru tykkar sálmar*
*og tað í tykkum bjóð,*
*sum gjørdi hesar heiðar*
*og eyr og hagasand*
*til gróðrarbúnar teigar.*
*Tit eiga hetta land.*

### Tjóðskapur og nationalisma

Í hesum sambandi havi eg hug at siga eitt sindur um tjóðskap og samleika. Í 19. og 20. øld hava vit sæð mong dømir um kollveltingar, onkur teirra hevur eydnast, tær flestu bera í síni slóð kríggj, oyðing og líðing, sum ongan enda tykjast at taka.

Skulu vit nú tala um eina føroyska rørslu, ið hevur dám av kollvelting, so er tað helst tann veking, sum tók seg upp o.u. 1890, vælanin um "tað nationala", sum í dag hevur heitið tjóðskaparrørslan. Var hetta ein kollvelting, var hon av mentunarligum slag, ein hugans ella andans rembing.

Henda rørsla merkti í stuttum, at føringar blivu tilvitandi um seg og sína serstøðu, mál, mentan og søgu. Hennara móðir var tann europeiska romantikkin, og hennara høvuðsfyritreyt tað, at føringar - sum greitt frá í fyrsta og øðrum parti av hesum fyrilestri - megnaðu at varðveita sítt mál ígjøgnum ta drúgvu hjálandatíðina.

Hon var samstundis eitt svar upp á ta djúpu trá eftir virðum, sum liggja uttan fyri gerandisdagin, og sum ikki kunnu mátast við logiskum ella støddfrøðiligum máli, sum tykist vera menniskjum í holdi borin. Vit kunnu rópa hesa trá, sum so ella so krevur at fáa ein útveg, sum er skyld við eros og ástarhug, og sum - um hon ikki verður stillað - verður umskapt til sjúku ella meinfýsni, tað skapandi irrationella.

Tá ið einstakir høvundar í dag óttast fyri hugtøkum sum tjóðskapi ella samleika, sum teir seta í samband við fyribrigdið nationalismu, er hetta eftir mínum tykki ein stór misskiljing. Nationalisma sprettur úr rótloysi og hevur yvir sær óektað erpni og ótolsemi mótvegis øðrum.

Tjóðskaparkensla og tilvitum eins egna samleika elva ikki til nationalismu, men eru heilsubót ímóti henni. Tilvitið um egnan samleika - ið kann koma til sjóndar á ymsan hátt, í klædnabúna, ítróttum, sangi, dansi, midnáttarsangi á ólavsøku osfr. - gevur føringum megi til at fóta sær í einum alsamt skiftandi heimi og gevur teimum ella okkum samstundis ein tiltrongdan møguleika til at rísa upp um gerandisdagsins átrúnaðarligu, staðbundnu, vinnuligu ella politisku skilarúm.

### Ósamsvar millum mentan og politikk

Um vit nú til seinast rógva á aftur høvuðsevnið og royna at evna til eina niðurstøðu, so síggja vit, at av teimum tilsamans átta londunum og oyggjabólkunum, sum endaðu við at vera at- og hjálond í tí dansk-norska ríkinum (og her er Noreg talt uppí), eru Ísland, Noreg og Føroyar tey einastu, sum hava varðveitt eitt slag av norrønum samleika. Lata vit politiskt frælsi telja mest, so eru Noreg og Ísland í fremsta rað. Taka vit mál og mentan uppí, so fáa Føroyar annað pláss eftir Ísland.

Í hesum sambandi eiga vit ikki at gloyma, at føringar sum teir einastu í Norðurlondum (og Europa) varðveittu henda merkiliga mentunararvin frá miðøldini, sum fatar um ringdans, kvøðing og kvæðayrking, sum er bæði søga, dansur, skaldskapur og sjónleikur í einum, og sum byggir brýr millum leik og lærd, fólk úr ymiskum samfelagsbólkum. At styrki og íblástur framvegis eru í hesum arvi, síggja vit bæði í siðbundnum dansi og á rákum innan nýggjari tónleik og sang, har gomul og nýggj mentan umskarast ella sameinast á kreativan hátt.

Ikki minni merkisvert er, at føringar lærdu málið hjá einum øðrum landi og ognaðust tess bókmentir og sostatt, uttan sjálvir at missa seg burtur og vera fyri málsligum falli, vunnu sær bæði tvímæli og tvímentan.

Samstundis mugu vit viðganga, um vit hyggja betur at myndini, at millum mentunarlig og politisk avrik er eitt ósamsvar, eitt asymmetriskt lutfall. Tí tær mentunarligu fyritreytirnar fyri politiskum frælsi - mál, tjóðskaparlig eind, serligir siðir, ein mentunaryvirtrom í nútíðarmerking (skúli, fjølmiðlar, list, gransking osfr.) - eru greidliga til staðar. Men politiskt frælsi, t.e. fullveldi, er ikki í sama mun vunnið.

Í hesum fyrilestri havi eg roynt at vísa á nakrar høvuðsorsakir til hetta ósamsvar. Okkara, mentunarliga sæð, sterka og greiða støða og okkara - í politiskari merking - meira ófullkomna avrik - sum skilliga sæst koma til sjóndar bæði á løgtingsvalum og í gallupkanningum - spegla aftur okkara søguliga baksýni og natúrgivnar landafrøðiligar og vinnuligar fyritreytir.

Samstundis tykist skilligt í fyrsta lagi, um ein hyggur aftur um bak, at eitt og hvørt framstig sjálvstýris- og sjálvbjargnisvegin er irreversibult, t.e. tað ber ikki til at fara aftur eftir hæli og leita upp farin stig. Og í øðrum lagi er greitt, at føroysk sjálvstýrismenning er dýnamisk, t.e. hon tekur seg áhaldandi frameftir. Framstigini eru tengd at og treytað av vinnu og búskapi, og - einfalt sett upp - kunnu vit siga, at við einum vinnuligum beini verður næsta stigið eitt samveldi av tjóðum í sínámillum javnstøðu, men eydnast tað at byggja upp eitt fjølstrongt vinnulív, ið hvílir á tveimum beinum ella fleiri, er fullveldi ein møguleiki.

Hvør leiðin at enda verður, er kanska treytað eisini av mótpartsins hugburði. Eitt føroyskt krav um javnstøðu í einum samveldi kann gerast veruleiki. Eitt tílíkt framstig hevði ivaleyst havt við sær, at Føroyar (og Grønland) straks fingu sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum. Skuldi tað hinvegin hent, at eitt tílíkt krav, ið var skilagott, undirbygt á skynsaman hátt og átti stuðul í einum dyggum meiriluta av fólkinum, ikki var virt, kundi úrslitið verið ein gongd, sum endaði við loysing.

### Tann neyðuga sjónliggerðin

Javnaðarfloksins møguleikar at taka lut í hesi dýnamisku menning eru treytaðir lutvís av tí politiska talvinum í Føroyum sum heild, av strategi og taktikki hjá øðrum flokkum, men ivaleyst eisini av floksins sjálvsmynd. Sum eg havi roynt at vísa á í hesum fyrilestri er Javnaðarflokkurin - um onkur skuldi havt gloymt tað - søguliga og í verki ein sjálvstýrisflokkur, og hevur umframt tað ta serstøðu, at hann eigur bæði eina tjóðskaparliga og eina sosiala dimensjón.

Hesi bæði eyðkennir, tað tjóðskaparliga (ella sjálvstýrismenningin) og tað sosiala, koma eftir mínum tykki ikki altíð týðiliga til sjóndar á miðlanna hermótum. Tí kann ein kanska siga, at Javnaðarfloksins trupulleiki - og møguleiki - í komandi tíðum er: politisk sjónliggerð.



*Brattalíð í Grønlandi, har Eirikur Reyði setti búgv o.u. 985. Ikki seinni enn 1500 vóru bygdirnar í Grønlandi útdeyðar og teirra norrøna mál horvið. Fara Føroyar og Norðurlond at vera fyri somu málsligu lagnu?*